# Uffe úti við snørinum

**Ude med snøren er heitið á bók um stuttleikafiskiskap eftir Uffe Ellemann-Jensen. Í bókini eru eisini upplivingar úr Føroyum**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Forlagið Gyldendal hevur givið út bókina Ude med snøren eftir Uffe Ellemann-Jensen. Undirheitið á bókini er Fisk og mennesker jeg har mødt. Uffe Ellemann-Jensen skrivar á sínum vanliga sjarmerandi máta um upplivingar, hann hevur havt við fiskatráðuni í hondini.

Í fororðunum skrivar hann eitt nú: - Sum stuttleikafiskari lærir tú at liva við næstan at fáa tað, sum tú strembar eftir. Tað hevur verið ein góð fyrireiking til stóru fiskarnar, eg havi mist í mínum politiska lívi. Sum tá eg næstan gjørdist forsætismálaráðharri, og tá eg næstan gjørdist aðalskrivari í NATO, - nøkur mál eg strembaði eftir við nærum líka heitum kenslum sum tá ið eg royni at fáa ein eyrriða á krókin. . . Og so lærir tú náttúruna at kenna, at liva við henni á ein heilt serligan hátt. Eg havi í mínum politikaralívi og sum stuttleikafiskari kastað snøri út um allan heim, eg havi fingið fong, og eg havi upplivað vónbrot. Og eg havi møtt teim mest áhugaverdu fólkum og fiskum. Hetta havi eg hug at siga grøðum frá, sum dámar eins væl og eg at sita í einum góðum stóli og uppliva alt aftur í eini bók, sum fortelur um gávuna tað er at vera fiskari við lív og sál.

Uffe Ellemann-Jensen, sum er føddur í 1941, hevur verið ein eyðsýndur persónur í donskum og altjóða politikki í 25 ár. Uttanríkisráðharri í nærum 11 ár, formaður í Venstre í 14 ár, og forseti í European Liberal Party í seks ár. Áðrenn hann gjørdist politikari, var hann ein sjónligur politiskur tíðindamaður, bæði í sjónvarpi og sum blaðstjóri á Børsen. Nakrar atkvøður í Føroyum vantaðu í til at hann kundi gerast forsætismálaráðharri í 1998. Hann fór úr politikki, og situr nú í eini røð av donskum og útlendskum nevndum og stýrum. Enn sum áður ferðast hann um allan heim, helst við fiskatráðuni í viðførinum.

Uffe Ellemann-Jensen hevur skrivað nógvar bøkur, serliga um búskap og politikk, og bókin Din egen dag er kort er mest selda bókin eftir ein politikara í Danmark í nógv ár. Ude med snøren er hansara fyrsta bók um stuttleikafiskiskap.

Bókin er 304 blaðsíður og kostar 279 krónur.




*Sjálvt í Føroyum er stilt á sjónum við hvørt. Tá kanst tú verða heppin á fáa ein stóran seið á krókin, skrivar Uffe Ellemann-Jensen*

## Ferðin til Betlehem




**Heimamissiónsforlagið hevur givið út barnabók um ferðina hjá Mariu og Jósefi til Betlehems**

ÚTGÁVA

Heimamissiónsforlagið hevur givið eina nýggja jólabók út. Hon eitur "Ferðin til Betlehem". Hetta er ein barnasøga um ferðina hjá Mariu og Jósefi. Augustus, sum var keisari, vildi vita, hvussu mongum menniskjum, hann ráddi yvir, og tí hevði hann boðið øllum at fara til ta bygd, sum tey vóru slektað úr, so øll kundu verða skrivað í manntal.

Tí fóru eisini Maria og Jósef avstað ta longu ferðina. Vit hoyra eina frálíka frásøgn um, hvat tey hava upplivað og støð á ferðini. Og vit ferðast við teimum - eftir bakkunum í Galileu og oman eftir tí rómverska vegnum oman til Jeriko. Vit skunda okkum gjøgnum ta fruktaleysu oyðimørkina og steðga á uttan fyri Jerúsalem. Og tá ið vit koma til Betlehems, fara vit at leita eftir onkrum at búgva í.

Myndirnar í bókini eru góðar. Tær vísa eina gerandisliga mynd av Palestina, og vit fáa eitt gott innlit í frásøgnina um Jesu føðing. Hjørleif Poulsen hevur týtt bókina úr enskum.

Bókin kostar 90 krónur, hon er at fáa á Heimamissiónsforlagnum í Nesvík og ymsa staðni runt landið.

# Súgvimerkið

**Súgvimerkið eitur nýggj ungdómsbók, sum forlagið Nýlendi hevur givið út. Norski rithøvundurin Unni Lindell hevur skrivað bókina, sum Jákup í Skemmuni hevur umsett**

ÚTGÁVA

Súgvimerkið eitur nýggj ungdómsbók eftir Unni Lindell. "Stella elskar Magna. Við øllum kroppinum. Við hvítum tonkum. Við reyðum hjarta. Hon hoyrir hann innan í sær... Tað fyllir hana við vónum og spenningi, men óttin fyri at missa ríður henni sum marran. Stella hevur nýliga verið fyri stórum skelki, tá ið hon misti mammu sína ..."

14-ára gamla Stella er í kreppu, og hon situr illa um sátt við nýggju vinkonuna, sum pápin hevur funnið sær. Í sorgini hevur hon stygt bestu vinkonu sína burtur frá sær. Hon kennir seg einsamalla heima og einsamalla í skúlanum. Men hon hevur gott eyga til Magna, sum er floksfelagi hennara. Hon má berja seg upp úr sorgini og finna kærleikan og vinna Magna fyri seg. Magni er vónin, og kærleiki hennara stendur til hansara. Í fyrstuni tykist hann einki leggja í hana. Men tá ið hon umsíðir fær hann, uppliva tey nógvar spennandi løtur saman, tí eftir harðan vetur kemur várið - og summarið...




Men tað var ikki Magni, ið gav henni súgvimerkið hin ringa dagin í Rottureiðrinum, tá ið hon varð kroyst niður móti kalda gólvinum og hoyrdi suðið úr gráu ánni. Ánni, sum ongantíð kemur á mál, og sum ongantíð steðgar á - sum sorgin hjá Stellu um mammuna, ið legðist sjúk og doyði.

Undir yvirskriftini En perle av en bok om ung kjærlighet skrivar ummælarin Terje Stemland á norska Aftenposten um Súgvimerkið:

"Stellas uutholdelige situasjon kulminerer med et angstanfall... på en skoledisco, og hun underkastes siden samtaleterapi hos psykolog. Tredje del av boken har tittelen "Kjærligheten". Da blir hun endelig sammen med Manne, heller ikke det forløper problemløst, men forholdet mellom dem er innsiktsfullt og varmt skildret, en ren perle om ung kjærlighet. Manne blir den personen som bidrar mest avgjørende til at Stella makter å vokse ut av sorgen... Sugemerket burde bli obligatorisk lesning for tenåringsforeldre."

Tá ið Unni Lindell í einum práti á alnetinum varð spurd, um Súgvimerkið "bara" var ein ungdómsbók, svaraði hon soleiðis:

- Ánei, Súgvimerkið kunnu vaksin eins væl lesa. Eg haldi ofta, at markið verður eitt sindur løgið, tá ið vit tosa um, hvat ið er vaksnamannabókmentir aftur ímóti ungdómsbókmentum. Einasti boðskapur, eg havi, er at raka okkurt í lesaranum, okkurt, sum lesarin kennir aftur. Harumframt vil eg fegin í Súgvimerkinum royna at siga nakað um, at tað kann eisini vera gagnligt at hava gjørt truplar royndir...

Unni Lindell er upprunaliga útbúgvin blaðkona. Millum gitnastu nýggju bøkur hennara eru Slangebæreren (1996), Måneorkestret (1998), Drømmefangeren (1999) og Sørgekåpen (2000).

Av virðislønum, sum Unni Lindell hevur fingið, kunnu vit nevna Riverton-virðislønina, 1989, Cappelen-virðislønina í1992, og í 1994 fekk hon Kritikerprisen júst fyri Súgvimerkið, sum nú kemur á føroyskum.

"Hesa náttina droymir hon um stór grasker, sum frysta í veltuni, og hon sær seg sjálva ganga við boygdum herðum og lyfta tey upp úr frystu moldini. Men hon er ikki før fyri tí, og tá ið hon gongur heim aftur til hús eftir grasgrónu rásini berføtt, er myrkt, og hon hevur gler ímillum fingrarnar. Tá ið hon rættar fingrarnar út, spegla stjørnurnar sær í sløttu løgvum hennara. Tí má hon ganga varliga, so at glerið skal ikki støkka og stjørnurnar detta niður á jørðina."

Unni Lindell, sum er fødd 3. apríl 1957, er í dag millum viðurkendastu rithøvundar í Noregi. Hon hevur skrivað meir enn 40 bøkur, bæði barnabøkur, ungdómsbøkur, stuttsøgusøvn, eitt yrkingasavn og krimibøkur. Hon verður í dag tald upp í tær nýggju norsku krimidrotningarnar. Men millum viðurkendastu bøkur hennara er ungdómsbókin Súgvimerkið, sum verður nógv brúkt í norsku framhaldsdeildini.

Kápuna hevur Olivur við Neyst teknað. Súgvimerkið, sum er prentað á Midtfyns Bogtryk, er 163 síður og fæst í øllum bókabúðum fyri 128 krónur. Nordbok og Mentanargrunnur Landsins hava stuðlað útgávuni.



Okkara minsti garnabátur, Gudrun:

# Armóð leiddi okkum á garnaveiði

**»Neyð lærir nakna kvinnu at spinna«, er gamalt orðafelli. Hetta kunnu brøðurnir, Kristin og Marius Vilhelmsen í Klaksvík, ásanna. Saman eiga teir útróðrarbátin, Gudrun, sum hevur verið á garnaveiði hvørt ár síðan 1994.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*




*Havtaskan heldur sær ómetaliga væl í gørnunum, sigur Kristin Vilhelmsen. Útróðrarbáturin, Gudrun, hevur loyvi at royna við 600 gørnum í tíðarskeiðinum, 1. apríl til 31. oktober. Um veturin rógva teir út Mynd: Skipalistin*

Tey fyrru árini av nítiárunum var fiskaloysi undir Føroyum, og í 1994 var einki at royna eftir við línu hjá 24 tons stóra útróðrarbátinum, Gudrun. Men hetta árið gjørdist eisini ein nýggj byrjan hjá Kristini og bróðrinum, Mariusi, sum tá fóru at royndarfiska eftir havtasku fyri Fiskirannsóknarstovuna. Tá vóru onnur størri skip longu byrjaði at fiska havtasku við gørnum, men áhugavert var at vita, um havtaska í hampiligum nøgdum eisini fekst nærri landi.

Tað, sum er serligt við garnaveiðini hjá Gudrun, er, at hetta er ein lutfalsliga lítil útróðrarbátur, sum hevur prógvað, at tað ber til at reka lønandi veiði eftir havtasku við einum slíkum báti.

### Garna-og línuveiða

– Eg vil siga, at tað fyrsta árið fekst ikki nógv burtur úr, og árið eftir var heldur ikki nakað serligt. Vit vóru ókunnugir við henda veiðihátt og mugu ásanna, at nógvi streymurin á grunninum var ein trupulleiki, tí gørnini fløktust illa. Men, sum frá leið fór at ganga betur, og seinnu árini hevur havtaskuveiðan havt stóran týdning fyri bátin og manningina, sigur Kristin Vilhelmsen.

Gudrun hevur øll árini síðan 1994 verið á havtaskuveiði í tíðarskeiðinum, 1. apríl til 31. oktober. Síðan hava teir roynt við línu um veturin og egnt í landi. Fimm mans eru knýttir at útróðrarbátinum. - Øll árini við undantaki av árinum í ár, hevur talan verið um royndarfiskiskap, men tá ið nýggja garnakunngerðin kom í mai, fingu vit veruligt fiskiloyvi til havtasku.

Kristin sigur, at tá ið royndirnar byrjaðu í síni tíð, royndu teir serliga eystanfyri, men nú royna teir bara royna norðanfyri. Hetta er eisini ein treyt í nýggja loyvinum. Men hetta passar teimum fínt, tí tað vísir seg, at norðanfyri fæst frægast burtur úr.

– Her er næstan eingin hjáveiða av øðrum fiskasløgum. Í fjør og fyrraári lá hjáveiðan um 3%; í ár var hon uppaftur minni, sigur hann. Hóast Gudrun hevði loyvi at royna heilt inn móti landi, fóru teir sjáldan inn um 10 fjórðingar og ongantíð inn um 6 fjórðingar. - Fóru vit inn um 8 fjórðingar, var ofta nógvur mosi í gørnunum, men eisini her fekst havtaska, sigur Kristin og vísir á, at fult so frægt vísir seg at vera at royna, har botnurin ikki er ov bleytur. Í dag hevur Gudrun ikki loyvi at royna innanfyri 12 fjórðingar, og teir kunnu royna út í kantin.

### Jøvn havtaskuveiða

Royndirnar, sum Gudrun hevur gjørt, hava víst, at meira og minni er at fáa allastaðni. Ongastaðni er einki at fáa, hvørki innari ella ytri.

Kristin vísir á, at veiðan seinastu árini hevur verið rættiliga jøvn; hon hevur ligið millum 75 og 80 tons fyri sesongina. Í ár fingu teir 82 tons, 78 í fjør og 82 í fyrraári.

– Í ár var prísurin ikki so góður sum í fjør, men hetta er framvegis ein góð veiða.

Spurdur, hvussu gongur at samstarva við aðrar skipabólkar, sum koma fram við, sigur Kristin, at tað hevur ikki verið nakar trupulleiki.

– Vit løgdu okkum á eitt øki norðanfyri. Har lógu vit púra stillir, drógu og settu aftur uttan nakrar sum helst trupulleikar. Men greitt er, at hetta er ein reiðskapur, sum tekur pláss og tí má upplýsast væl, hvar hann stendur. Vit gera nógv við at siga frá, og vit royna leingi á somu leið. Mær kunnugt, er ongantíð hent, at nakar hevur sett omanyvir okkara reiðskap. Her koma eingir útróðrarbátar við línu, tí vit eru so uttarliga, og snelluskipini eru sum oftast ytri enn vit, sigur Kristin.

### Fáa væl við línuni

Síðan Gudrun dróg gørnini, hava teir verið tríggjar túrar við línu og fingið tilsamans 18.000 pund. Teir egna í landi og seta 40 stampar hvørja ferð.

Agnið hevur verið kúfiskur og hørguslokkur. Størri helmingurin av veiðini hevur verið hýsa, restin gráur fiskur.

Kristin Vilhelmsen sigur, at tað yvirhøvur hevur gingið væl hjá útróðrarbátunum í ár og í fjør.

– Tað er onkur, sum hevur fiskað fyri meira pengar enn vit, sjálvt um vit eisini fiska havtasku. So, útróðurin er hugaligari í dag, enn tá ið vit fóru at royndarfiska eftir havtasku í 1994, sigur hann at enda.

Togan um døgurðatíman á Kósini:

# 89 vilja sleppa fyrr heim, 31 vilja ikki

**Ætlanin var, at døgurðatímin millum 12 og 13 skuldi broytast til ein matarsteðg frá mánadegnum at rokna, men enn eru ikki allar súður syftar. Arbeiðskvinnufelagið hevur givið »grønt« ljós fyri hesum, men arbeiðsmannafelagið hevur ikki tikið støðu.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Á Kósini undrast tey, sum eru fyri matarsteðginum heldur enn døgurðatímanum á, at ein stórur meiriluti tapir fyri minnilutanum. Í løtuni er ógreitt, hvussu verður við døgurðatíman-um á Kósini*

Á flakavirkinum Kósini í Klaksvík hevur ein ávís togan tikið seg upp um døgurðatíman.

Skipanin er hon, at tá ið klokkan slær 12, fer arbeiðsfólkið heim til døgurða. Hetta merkir, at vanligi arbeiðsdagurin varar til kl. 17. Á fleiri virkjum er skipanin hon, at arbeiðsfólkið hevur ein matarsteðg uppá ein hálvan tíma á døgurða. Sambært sáttmálanum er døgurðatímin frá kl. 12 og 13, men verður arbeitt hendan tíman, fært tú dupulta løn. Tað merkir, at hevur tú ístaðin ein matarsteðg uppá ein hálvan tíma, fært tú løn fyri ein heilan tíma og kanst fara til hús kl. 16 við átta tímum í skjáttuni.

### Stórur meiriluti fyri

Slíkar broytingar krevja í fyrsta lagi, at arbeiðsfólkið vil hava tær og í øðrum lagi, at arbeiðarafeløgini geva sítt samtykki. Men á Kósini er ikki full semja um hesa ætlaðu broyting, hóast meirilutin fyri henni er stórur. Tey, sum vilja hava matarsteðg og harvið sleppa heim ein tíma fyrr, heittu á leiðsluna á virkinum um at fremja hesa broyting. Leiðslan játtaði, um meiriluti var fyri. Fyrr í heyst atkvøddi so arbeiðsfólkið um hesa broyting, og úrslitið var, at stórur meiriluti var fyri at hava matarsteðg heldur enn døgurðatíma; 89 atkvøddu fyri og 31 ímóti. Nakrar fáar atkvøður vóru blankar. Sum skilst, hava arbeiðsgevarar av og á róð uppundir at avtaka døgurðatíman, men hetta vilja feløgini ikki hoyra talan um, tí hetta er ein dýrur tími. Hinvegin plaga feløgini ikki at blanda seg uppí, um fólk fara heim til døgurða, ella um tey hava ein matarsteðg uppá hálvan tíma og fáa løn fyri heilan tíma. Kortini skulu feløgini góðtaka eina slíka avgerð, áðrenn hon verður sett í verk.

### Arbeiðsmannafelagið drálar

Nevndirnar í arbeiðsmannafelagnum og arbeiðskvinnufelagnum í Klaksvík hava havt málið til viðgerðar, og tað stóð ikki á hjá arbeiðskvinnufelagnum at geva ætlaðu broytingini »grønt« ljós, tí meirilutin á Kósini er so stórur.

Men felagið hjá monnunum er eftir øllum at døma ikki so sannført um hesa broyting, tí nevndin segði seg ikki kunna taka støðu.

Ætlanin var annars, at broytingin skuldi koma í gildi síðsta mánadag, men fríggjadagin kunnaði leiðslan á Kósini arbeiðsfólkið um, at tey bíðaðu eftir avgerðini hjá arbeiðsmannafelagnum, tí »svarið«, tey høvdu fingið, kundu tey ikki brúka til nakað.

Tey, sum eru fyri matarsteðginum heldur enn døgurðatímanum, undrast yvir svarið hjá arbeiðsmannafelagnum, sum hvørki var eitt »ja« ella »nei«. Tey siga, at nógvir menn eru millum tey 89, sum taka undir við broytingini, sum merkir, at vanligi arbeiðsdagurin er liðugur kl. 16. Hini 31 vilja, sum higartil, heldur sleppa heim til døgurða og arbeiða til kl. 17.

### Ógreiða um tíman

Skipanin við matarsteðgi í døgurðatímanum er annars hon, at verður t.d. arbeitt til kl. 16, verður tímin millum 16 og 17 ein yvirtími.

Á Kósini vita tey ikki, hvussu málið nú fer at tørna út, men tey, sum eru fyri matarsteðginum, undrast yvir, at ein so stórur meiriluti ikki verður hoyrdur.

Eitt er so greitt; tað ber ikki til, at nøkur fara heim til døgurða og onnur ikki.